# ka støðu

*Kanska beinleiðis fólkaræði er rætta loysnin?*



ikki hava eitt veruligt trýbýti av valdinum. Dómsvaldið er danskt og tí ikki undir føroyskum valdi. Og tá samgongan er meirilutin í tinginum, har ikki skotter millum hesar báðar partar. Í dag er landsfyrisitingin sterk og ger í stóran mun lógaruppskot fyri samgonguna, men Tingið er so veikt afturímótið, m.a. tí teir ikki hava fólk knýtt at sær til tess at gera alternativ uppskot.

**Løgtingið**

Mannarætturin í hesum uppskotið staðfestur bara nøkur breið hugtøk, sum Løgtingið má taka støðu til. Tað er ógvuliga sveimandi, men leggur upp til at løgtingsumboðini skulu stinga út í kortið, hvørji virðir Føroyar skulu byggjast á eins og tað má takast fyri givið, at ætlanin er at fylgja altjóða sáttmálum og at við fylgja við í menningini sum okkara grannalond hava.

**Løgtingið fær orðið**

Uppgávan Løgtingið fær fyri at fylla tað út, sum verður stungið út, verður stór, ógvuliga stór. Men tað er sjálvsagt at tað er parlamentið sum skal verða kjarnin. Tí er tað bæði synd og skom, at Løgtingið ikki luttekur meira í stýriskipanararbeiðinum. Uppskotið til grundlóg er minimalistiskt og leggur tí stóra ábyrgd á politikararnar. So er bara at vóna, at vit taka undir við altjóða sáttmálum og beinanvegin fáa fylt uppá. §10 sigur at øll eru javnt í metum, latum okkum eisini lata hetta umfata tey samkyndu.